| Spurningar og svør | | Ábyrgd |
|---|---|---|
| 1 | **Kunnu vit síggja hvat nevndin arbeiðir við?**<br>**Viðmerking: Annika Sølvará: Mær dámar gjøgnumskygni, eitt teldubræv hvønn 3. mánaða um kunning hevði verið gott.** | |
| | Umvegis umboðið er besta boð, títt umboð í Landsnetnevndini.<br>Svar til viðmerking: Hilmar: Tikið til eftirtektar, og leggja tilfar út á heimasíðuna. | *Hilmar* |
| 2 | **Nú øll ekspertisan verður samlað í KTL, hvussu skulu aðalráðini tá greiða sína eftirlitsskyldu innan KT-trygdarøki, soleiðis at ein ordilig grannskoðan verður gjørd.** | |
| | Lætt verður munandi um eftirlitsskylduna, um ráðini fáa eina grannskoðaraváttan. Eftir míni meining, so hava ráðini uttan eina grannskoðaraváttan ongan kjans at fremja veruligt kt-eftirlit á stovnunum. | *Leif* |
| 3 | **Skilti eg Michael Ørnø rætt, at hann segði, at teirra strategi var at goyma alt data innan danska markið? Í so fall áttu vit eisini gjørt tað í Føroyum? Hugsi m.a. um peningastovnarnar.** Lovgivning. Dropbox, SkyDrive bliver brugt til at udveksle data. Vi bliver nødt til at lave et alternativ, G-Box, som gemmer data indenfor landets grænser. | |
| | KTL hyggja sum eftir eini loysn, sum eitur SkyDrive Pro og, sum koyrir á SharePoint 2013. | *Birgir* |
| 4 | **Hvat er munurin millum tað danska og føroyska sentrala KT-konseptið – hvørjar tænastur, kostnaðarstøði og prísásetingarmodel?** | |
| | MØ: Der er utrolig mange ligheder. DK: Vi har mange forskellige kunder, små kunder siger, vi skal varetage alle ting, hvor store kunder kun beder om serverkapacitet. Den store forskel er, at vi varetager fagsystemers drift, bl.a. af ESDH systemer. Ellers er en stor forskel, at Statens-IT er dyrere end KTL. Vi har også fået lavet en benchmark, som viste at vi ligger under gennemsnittet, men ikke så langt under som Landsnet gør. | *Nicolai/ Michael* |
| 5 | **Nær verður SharePoint 2013 tøkt?** | |
| | Tað er tøkt nú. Frá 1. juli verður 'SharePoint 2013' høvuðspallurin og her kunnu vit veita vissu fyri einum høgum tænastustigi. | *Nicolai* |
| 6 | **Eru brúkararnir enn tvungnir at vera limir í Statens IT?** | |
| | Nej | *Michael* |
| 7 | **Átti KTL ikki at bjóða opensource alternativir til skipanir?** | |
| | Firefox liggur í Software Center á teldunum og KTL kannar møguleikarnar fyri at leggja Libre Office í Software Center | *Birgir* |

| | | |
|---|---|---|
| 8 | **Nær verður Windows 8 tøkt?** | |
| | Windows 8.1 er tøkt nú til nýggjar teldur, og vit arbeiða støðugt við at leggja drivarar inn til eldri teldur soleiðis, at tær eisini kunnu koyra Windows 8.1. | *Birgir* |
| 9 | **Nær fáa vit felags 360 platform? Ovurstór íløga hjá einum lítlum stovni at skifta til 360. Helst stórir sparingar hjá landinum.** | |
| | Einki ítøkiligt í umbúna. Sama ynski frá nógvum stovnum, so hetta umhugsa vit á KTL at gera nakað við. Her er upplagt at hyggja eftir átakinum, sum Statens-IT hevur í umbúna at seta í verk. | *Nicolai* |
| 10 | **Hvussu nógv koyra við ”tunnum klientum”, og hviussu nógv koyra við farteldum/pc á Landsneti?** | |
| | 900 vanligar teldur, 600 tunnir klientar. | *Nicolai* |
| 11 | **Hví skulu vit velja loysnina við eksternum brúkarum 300 kr/mðr, tá vit kunnu hava ekstranet nógv bíligari?** | |
| | Eksternir brúkarar eru brúkarar á stovninum, sum hava ein brúkara at innrita við, fyri at fáa fatur á onkrari fakskipan. Hesir brúkarar fáa ikki atgongd til Office og hava heldur ikki teldupostkassa ella atgongd til fíl-mappur á netinum. Um stovnur hevur tørv á at geva uttanhýsis atgongd til fólk, sum ikki er sett á stovninum, til eina SharePoint síðu, so verður hetta roknað sum ein SharePoint brúkari og tvs. 50 kr/mðr. | *Nicolai* |
| 12 | **Hví brúka tit ikki 360 ístaðin fyri intranet á Landsneti?** | |
| | Vit meina ikki, at tað loysir sama tørv. 360 er fyrst og fremst til journal og skjalahandfaring, meðan intranetið, umframt skjalahandfaring, eisini er eitt felags stað, har tíðindi, kalendarar, handbøkur v.m. liggja. | *Nicolai* |
| 13 | **Skulu vit hava atgongd til Cloudloysnir um tað er so ótrygt?** | |
| | Sum byrjanarstøði meina vit ikki. Tað valdast sjálvsagt hvørjar tænastur og ikki minst hvørjar dátur umhugsað verður at brúka cloudloysnir til. | *Nicolai* |
| 14 | **G Cloud? Nær fær tað almenna cloud? ”Private stovnscloud”** | |
| | KTL hyggur eftir at bjóða stovnunum líknandi loysn sum Statens IT. Talan er um innbygda loysn í SP2013, sum kallast SkyDrivePro. Hetta hava vit meira um seinni í 2014. | *Nicolai* |
| 15 | **Hvad anser Statens IT som den største trussel mod beskyttelse af personsdata og interne oplysninger?** | |
| | Onki svar | *Michael* |
| 16 | **Hevur KTL ein politikk um Dropbox, SkyDrive, iCloud og tilíkt?** | |
| | Nej, men leiðreglur fyri brúkarar*, sum vit mæla øllum stovnum til at taka í nýtslu, mælir til ikki at brúka hesar goymslur til arbeiðsdátur. KTL hevur í dag trygga loysn innanhýsis á Landsneti.<br>*sum liggur sum fylgiskjal í sáttmálanum millum stovnin og KTL | *Nicolai* |

| | | |
|---|---|---|
| 17 | **Liðugt uppsettar teldur/teldlar, var tað nakað KTL kundi átt inni?** | |
| | KTL eigur í dag einkultar teldur til láns. Teldlar hava vit ikki. Hava ikki í umbúna at hava nógv sløg av teldlum inni, men umhugsa at hava nakrar Surface til láns | *Nicolai* |
| 18 | **Verður arbeitt við at finna fløskuhálsar á netinum (samnet) og at betra ferðina?** | |
| | Ferðin verður fyrst og fremst avgjørd av, hvat fyri ferð haldið hevur. Ynskir man meira ferð, so ber til at velja eitt hald við hægri ferð. KTL ger javnan ferð testir fyri at tryggja, at stovnarnir fáa tað, teir gjalda fyri. | *Birgir* |
| 19 | **Fer KTL at vera meira involvera í hýsing og rakstri av fakskipanum í framtíðini?** | |
| | Hetta er eitt ynski frá fleiri stovnum. Vit eru í ferð við at gera eina viðlíkahaldsavtalu við Formula um rakstur av felagsinstallatiónini av 360, sí annars svar um felags 360 platform. | *Nicolai* |
| 20 | **Trygdarpolitikkur – verður hetta sum partur av verandi tænastu/kostnaði ella eykakostnaður?** | |
| | Tað, sum kemur afturat tí, sum er í dag (tað at grannskoða fakskipanir og tað sum liggur á stovnunum), skulu stovnarnir rinda fyri. Tað at samskipa hesa uppgávuna við Gjaldstovuna verður munandi bíligari enn, um stovnarnir hvør í sínum lagi skulu gera hetta sjálvir. Men hetta, at fáa trygdina upp á pláss, er eitt val hjá stovnunum. | *Leif* |
| 21 | **Hvat gera vit um Microsoft fer konkurs í 2015?** | |
| | Hetta meta vit ikki er sannlíkt, og hava tí ikki viðgjørt henda spurning. Skuldi MS fari á húsagang, eiga vit rættin til forritini, og kunnu tískil koyra víðari sum í dag, inntil vit hava fingið lagt um okkara umhvørvi til aðra tøkni. | *Nicolai* |
| 22 | **Kostar tað 50 kr/mðr fyri hvørja fartelefon, sum kann móttaka teldupost?** | |
| | Nej, tað kostar fyri hvønn brúkara, sum hevur eina ella fleiri eindir, sum móttaka teldupost. | *Nicolai* |
| 23 | **Vit hava samlað 360 á felagsplatform í Landsneti. Hvar er okkara sparing, samanborið við 35% sparing hjá statinum?** | |
| | Kostnaðurin av felags 360 loysnini hjá Landsnetið er uml Kr. 115.000 árligt. Høvdu somu stovnar, sum koyra á felags 360, havt hvør sína loysn, høvdu útreiðslurnar verið kr. 732.600. Talan er einans um útreiðslur fyri licensir og rakstur av servarunum. | *Birgir* |

| | | |
|---|---|---|
| 24 | **Hvat umfatar Samnet?** | |
| | Samnet er, isolerað sæð, sjálv linjan millum stovnin og Landsnet og allur trafikkur millum skipanir og internet fer umvegis samnetið. GG: Vit hava ikki klassað okkara net at kunna nýtast til IP telefoni. | *Birgir* |
| 25 | **Kunnu vit síggja grannskoðaraváttanina frá 2012?** | |
| | Ja, stovnarnir kunnu biðja um váttanina, sum vit so senda stovnunum. | *Leif* |